Skemt



# Føroya rættur nýggja útsjónd

Dimmalætting skrivar í vikuni, at Føroya rættur skal hava nýggja útsjónd. Tað kann verða, at rætturin herheim fer at lata seg insiperera av kanadiska hægstarætti, tá tað kemur til klæðini. Hevði stemingurin ikki blivið nógv betur í rættinum, um dómararnir líktust jólamonnum?



## Vesturkirkjan til sølu

**Í farnu viku, tá ið rokið um døgurðan við íslendska forsætisráðharranum var upp á tað hægsta, setti onkur Vesturkirkjuna til sølu á sel.fo. Grundgevingin fyri søluna var: "Sælges fordi jeg er flov af Jenis og gider ikke at være kristen mere". Lýsingin var strikað stutt eftir, at hon var løgd út.**

## Søkti eftir konu

Ein gamal drongur var blivin rættiliga keddur av, at hann ikki hevði nakra konu. Hann hevði hugsa um allar hugsandi og óhugsandi møguleikar fyri, hvussu hann skuldi fáa fatur á einum konufólki. Hann helt, at ein roynd var at seta eina lýsing í bløðini. Hann so gjørdi.
- Maður í 30'unum svvøkir konu, skrivaði hann millum annað.
Innanfyri eina viku hevði hann fingið hundrað brøv. Øll frá monnum, sum bjóðaðu honum sína konu.

## Í RANGASTRÚPAN

**Vit krevja pengarnar aftur!**
Føroyska fótbóltslandsliðið er farið 20 pláss aftur
*Portal.fo*

**Ja, nær annars?**
Tað var gott, at hálveikurin kom akkurát, tá hann kom
*Jón K. Poulsen í samrøðu við Rás2*

**Ósjónlig**
Eingin sá Drotningina í Havn
*Portal.fo*

**Spælandi venjari?**
Tá valdi enski landsliðsvenjarin, Fabio Capello, at byrja inni við Wayne Rooney.
*Sportal.fo*

**Hvat sker?**
Undirlív av bakkastokki
*Portal.fo*

**Neyvan ófólkaligum...**
Hotel Føroyar søkir eftir fyrikomandi tænastufólki
*Starvslýsing*

**Tey hava mist málið**
Málleyst í Runavík
*Sportal.fo*

**Tað mátti henda!**
Trølla Omman rendi á húkin
*Portal.fo*

**Nýtt yrki á gamalsaldri**
Clinton til Egyptalands at byggja brýr
*Dimma*

**Tónleikarar passa troyggjur**
Marius og Lyon í Tøting
*Planet.fo*

UMAFTURAFTURUM
HØGNI DJURHUUS



# Lakka paradís í Homophobia

Gloymið landsliðið, sum vann ein fótbóltsdyst fyri 20 árum síðani.

Gloymið sjógvin, sum var reinur fyri 200 árum síðani.

Gloymið náttúruna, sum var óspilt fyri 2000 árum síðani.

Gloymið hatta smarta tosið um sól og vátakava, logn og ódn sama dag.

Gloymið Simon Anholt og Samvit og Ferðavinnudeildina fyri alment diplomati.

Blakið allar reklamur á tað skitna vestfallið ella tyrvið tær í náttúruni.

Og drepið alla ta grind, sum verður funnin.

Gevist við at branda Føroyar sum "The land of maybe," hóast Føroyar so sanniliga eru tað.

Skulu vit endiliga hava eina lýsing, sum sigur sannleikan, tað er eina øðrvísi lýsing, eina álítandi lýsing, so er besta og sterkasta brandið "Visit the land of homophobia."

So sleppa vit aftur í New York Times. So velja ferðafólk, sum eiga pengar, okkum fram um Iran, Saudi Arábia ella Ku Klux Klan.

So tá, ella um, ferðavinnan fær upp í lag at gera annað enn at gremja seg um vantandi stuðul frá tí almenna, eigur hon ongantíð ov skjótt at fara í holt við at branda Føroyar sum homofobiskt paradís. Tað fer at geva úrslit, sum vert er at tosa um í egningarskúrum og skræða seg um á feysbukkuni.

Homophobia er eitt lokkandi, tølandi orð, ja, næstan gandakent, huldukent. Eisini hjá teimum, sum ikki vita, hvat orðið merkir.

Homophobia er eitt ævintýrland heilt har norðuri í myrkrinum. Har sum veðurgudarnir lakka paradís. Býr Harry Potter har? Ella Dark Vader, fara tey at spyrja?

Ferðavinnan, ja, ferðavinnan. Nú vil eg ikki hoyra ella síggja eitt einasta orð afturat um makrel, hoyrir tú nógv suffa ella banna í hesum stríðsári. Friðartingingar verða í London (don´t mention the pilot whale!) 12.oktober.

Eg sigi fyri meg: nú vil eg ikki hoyra ella síggja eitt orð afturat um føroyska ferðavinnu.

So hetta royni eg at skriva við blindskrift, sum eg lærdi, royndi at læra, í Handilsskúlanum fyri hálvari øld síðani.

Fyrr vóru ferðafólk fangað her í Føroyum. Ferðafólk, sum skuldu til Íslands, meðan Norrøna fór til Bergens at venda.

Nú er Bergen ikki til longur.

Men sum landsstýrismaðurin so vísiliga segði: ein millión, sum verður brúkt til ferðavinnuna, kemur níggju ferðir aftur. Hvar eru so allar hasar milliónirnar?

Og hví skal neyðars kroysti skattgjaldarin stuðla ferðavinnuni? Geva Uttanríkisráðnum nógvar milliónir um árið at seta fólk í básar á messum uttanríkis til onga nyttu higartil.

Um tað veruliga er so sum landsstýrismaðurin segði, hví spleysa gistingarhús, flutningsfeløg og tey, sum siga seg selja upplivingar, ikki saman nakrar milliónir? Fýra tildømis og fáa 36 aftur.

Eg havi enn ikki sæð ella hoyrt nakra skilagóða grundgeving fyri, at vit skulu draga og lokka ferðafólk til Føroya.

Eg meini so við, tá ferðavinnan ikki klárar seg uttan pengar úr landskassanum. Gamaní, kanst tú svara, vit hava fiskivinnu. Men hvat gevur ferðavinnan okkum føroyingum?

Men ferðavinnan heldur fram og ikki minst kroniska keglið um hana.

Men eg skal annars einki hava fyri mítt frálíka uppskot at branda Føroyar sum Homophobia. Hóast tað gevur pengarnar 666 ferðir aftur.

Ferðamenn, ferðakonur og ferðabørn, vælkomin til Homophobia, har sum veðurgudarnir lakka paradís, og allir aðrir gudar krympa tær.